

*Skírishóskvøld verður Maria Guttesen at hoyra í Århus*

**Landsfundur Sambandsflokksins**
**2005**

Verður í Bygdarhúsinum í Leirvík fríggjakvøldið 1.- og leygardagin 2. apríl.

*Fundarskrá samb. viðtøkunum og viðtøkubroyting*

Leygarkvøldið kl. 19.30 verður veitsla á sama stað. Tekning til veitsluna á tlf. 318870 / faks 312496 / teldupostur samband@post.olivant.fo

Seinasta freist at tekna seg til veitsluna er hósdagin 31. mars á middegi.
**Kostnaður fyri veitsluna: 150 kr.**

*Øll sambandsfólk eru vælkomin*

**Landsnevndin**

**Sambandsflokkurin**

Sosialurin

# Maria og Divided Minds á Fatter Eskil í Århus um páskirnar

**Skírishóskvøld spælir Maria Guttesen við bólki sínum Divided Minds á vælumtókta og hugnaliga spælistaðnum Fatter Eskil í Skolegade 25 í miðbýnum í Århus**

KONSERT
*tíðindaskriv*

*"En udelt fornøjelse!"* og *"Højdepunktet var dog Maria Guttesens vokal, der med sin lække, hæse kant, til tider smøg sig sødmefyldt ind i øregangen, for øjeblikket efter at trænge igennem med overraskende styrke"* skrivar ummælari í Herning Folkeblad eftir konsert hjá Mariu og Divided Minds í Ikast 9. mars í ár. Ummælið finnur tú í fullari longd á www.dividedminds.dk

Divided Minds gav út fløguna "The Last Night" í Føroyum í juni og í Danmark í august 2004.

Á skránni til konsertina Skírishóskvøld eru løg av nýggju fløguni "The Last Night" og fleiri nýggj góð løg. Tónleikastílurin hjá Divided Minds er góður og melidiøsur og spennandi pop/rockur.



UNDANFØRLEIKI

## Hovstunnilin

**Útbjóðandi myndugleiki**
Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-100 Tórshavn
Heimasíða: www.landsverk.fo
T-post: lv@lv.fo

Landsverk er ein almennur stovnur undir Vinnumálaráðnum. Sum byggiharri tekur Landsverk sær av almennum byggiuppgávum.

**Mannagongd fyri útbjóðing**
Arbeiðstøkan verður útboðin í innbodnari høðvusarbeiðstøku við undanførleika. Útbjóðandi myndugleikin ætlar at heita á 5-7 tilboðsveitarar um at geva tilboð.

**Lýsing**
Høvuðsarbeiðstøkan umfatar øll arbeiði í sambandi við gerð av tunnilssambandi millum Øravík og Hov. Undir hesum hoyrir: 2445 m sprongdur tunnil, klassi T9,5, 3215 m atkomuvegir, 4 vegarbrýr, innleggingar og trygdarútgerð.

**Umbøn um luttøku**
Umbønin skal sendast til:
Landsverk
Postboks 78
FO-100 Tórshavn

Umbønin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 31. mars 2005

**Áheitan um luttøku**
Áheitanir um at geva tilboð verða sendar út saman við útbjóðingartilfarinum umleið tann 15. apríl 2005.

**Rættarligur formur í sambandi við samtøk**
Allir luttakarar í einum samtaki ella líknandi felagsskapum skulu, áðrenn sáttmálabýting við útbjóðandi myndugleikan, geva skrivliga váttan fyri felags hefting og ábyrging fyri sáttmálanum. Felagsskapir ella líknandi skulu haraftrat frammanundan útnevna ein umboðsmann við skjal-próvaðari umboðsfulltrú til, vegna felagsskapin, at tekna bindandi avtalur við byggiharran.

**Upplýsingar at nýta til undanførleika**
Umsøkjararar skulu saman við eini umbøn um luttøku senda hesa upplýsingar:

Upplýsingar um egnu viðurskifti arbeiðstakarans og tær neyðugu upplýsingarnar og formleikakrøvini til metingar av tí kravdu minstuorkuni av búskaparligum, fíggjarligum og tekniskum slag.

Upplýsingar um fyriskipanina hjá fyritøkuni, undir hesum møguligt samband við móðurfelag.

Váttan ella trúnaðarváttan um í hvønn mun arbeiðstakarin hevur ógoldnað skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar.

Avrit av viðkomandi vinnulívstrygging, upplýsing um eginpening og javna í roknskapi, tá ið søkt verður, saman við einari váttan av samlaða umsetninginum í miðal hjá fyritøkuni síðstu trý roknskaparárini.

Eina váttan um árliga miðaltalið av fólkum í starvi hjá fyritøkuni.

Ummæli frá samsvarandi uppgávum.

Lívsgongdarlýsing (CV) hjá nøkrum lyklafólkum, ið verða sett á uppgávuna.

Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og heilsuskipanir umframt umhvørvisstýrisskipanir hjá fyritøkuni.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*